Ár 2010, hin 25. november

145.
08/00135 Val av nevndum – umval til barnaverndarnevndina.

Í sambandi við at Gvøðbjørg Vest hevur sagt seg úr Barnavernd¬ar¬nevndini, skal nýggjur limur veljast fyri hana, galdandi fyri restina av inniverandi valskeiði, sum endar í 2012. Varalimur fyri Gvøðbjørg Vest er Vónbjørt Guðjónsson.

Í sambandi við at Terje Kjærbo, limur í Barnaverndarnevndini, andaðist í oktober, skal nýggjur limur veljast fyri hann, galdandi fyri restina av inniverandi valskeiði, sum endar í 2012. Varalimur fyri Terja Kjærbo er Signhild V. Joensen.

Býráðsins samtykt: Samtykt at velja Harriet Hvidbro sum nýggjan lim fyri Gvøðbjørg Vest. Samtykt at velja Signhild V. Joensen sum nýggjan lim fyri Terja Kjærbo og Tummas J. Lervig sum nýggjan varalim.

146.
10/00843 Gamli Skipafelagsbygningurin sum mentanarhús

Sp/f HERL-ligt u.s. heitir á Klaksvíkar Kommunu um loyvi at nýta gl. Skipafelagsbygningin til alment mentanarhús. Ætlanin er at nýta bygningin til ymisk sløg av tiltøkum so sum, sjónleik, konsertir, møti, veitslur, dans og ymisk onnur tiltøk. Eisini er ætlanin at gera eina innskotna loftshædd og inrætta hesa til matarstað við skeinkiloyvi. Verandi økisáseting (B5) er útløgd til vinnuøki og loyvir tí ikki umsóktu nýtslu av bygninginum.
Byggi-og býarskipanarbólkurin viðgjørdi málið tann 19.10.2010 og mælir til, at økisásetingin verður broytt frá vinnuøki til Vinnu- og Mentanarøki og kann virksemi verða alt slag av ikki umhvørvistyngjandi vinnu, herundir undirhaldsvinnu, so sum dansur og líknandi.

Ferðslunevndin tekur á fundi 2. nov. 2010 undir við tilmælinum frá Teknisku Umsiting, dagf. 29. okt. 2010.

Havna- og Vinnunevndin tekur á fundi 2. nov. 2010 undir við tilmæli frá Teknisku Umsiting, dagf. 29. okt. 2010 og mælir til, at leigan verður økt við kr. 2000,- pr. mánað, og at serlig atlit verða tikin til trygdina í samband við nýggja virksemið.

Tekniska Nevnd tekur á fundi 2. nov. 2010 undir við tilmælinum frá Teknisku Umsiting, dagf. 29. okt. 2010.

Mentanarnevndin tekur á fundi 3. nov. 2010 undir við tilmæli, 29. okt. 2010 og mælir annars til, at serlig atlit verða tikin til trygdina í sambandi við virksemið.

Byggi- og Býarskipanarnevndin tekur á fundi 4. nov. 2010 tekur undir við Mentanarnevndini, 3. nov. 2010.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt við teirri broyting, at samráðingar verða tiknar upp við leigaran um økingina í leigugjaldinum á kr. 2.000,- pr. mánað.

147.
10/00889 Gøtuljós til íbúðabygging hjá Norðhús á Norðoyri

Norðhús biður um loyvi at knýta gøtuljósini uppí ta kommunalu skipanina, og at kommunan rindar fyri helmingin av gøtuljósunum, sum mugu setast upp inni á íbúðaøkinum. Sí skriv frá umsitingini dagf. 27. okt. 2010.

Tekniska Nevnd tekur á fundi 2. nov. 2010 undir við tilmæli frá Teknisku Umsiting, 27. okt. 2010.

Fíggjarnevndin tekur á fundi 10. nov. 2010 undir við Teknisku Nevnd 2. nov. 2010.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt.

148.
08/00149 Um- og nýbygging, Skúlin við Ósánna – 1. viðgerð

Byggingin av Skúlanum við Ósánna gongur sum ætlað, men tað vísir seg nú, at reguleringin av upprunaligu samtyktu íløguavsetingini í 2010 úr 18 mió. kr. niður í 15 mió. kr. ikki heldur. Byggingin og tíðarætlanin fyri liðugtgerð av verkætlanini krevur, at 17 mió. kr. eru tøkar í inniverandi ári. Tørvur er sostatt fyri einari eykajáttan uppá 2 mió. kr. Sí eisini skriv frá umsitingini, dagf. 29. okt. 2010, har mælt verður til, at býráðið økir íløgujáttanina.

Tekniska Nevnd tekur á fundi 2. nov. 2010 undir við tilmæli frá Teknisku Umsiting, dagf. 29.10.2010, og heitir samstundis á umsitingina um at uplýsa, um pláss er fyri innbúgvinum í budgettinum. Hetta vísandi til skriv frá Mentanardeildini, dagf. 2. nov. 2010.

Mentanarnevndin tekur á fundi 3. nov. 2010 undir við Teknisku Nevnd 2. nov. 2010 – Annars verður málið møguliga at taka upp í sambandi við temafundin um fíggjarætlan 2011.

Fíggjarnevndin tekur á fundi 10. nov. 2010 undir við Teknisku Nevnd 2. nov. 2010 og Mentanarnevndini 3. nov. 2010.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt.

149.
10/00823 Lendi undir seyðahúsi (innistøðu) á Norðoyri

Búnaðarstovan biður um ummæli til, at undirlendið undir einum seyðahúsi á Norðoyri verður selt bóndanum. Kommunan er bara ummælandi partur í málinum.

Tekniska Nevnd tekur á fundi 2. nov. 2010 undir við tilmæli frá Teknisku Umsiting, dagf. 28. okt. 2010.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt.

150.
10/00900 Frábýti av lendi á Norðoyri

Í sambandi við festaraskifti á Norðoyri biður Búnaðarstovan um ummæli av frámatrikulering av øki undir seyðahúsi á Norðoyri. Kommunan er bara ummælandi partur í málinum.

Tekniska Nevnd tekur á fundi 2. nov. 2010 undir við tilmæli frá Teknisku Umsiting, dagf. 28. okt. 2010.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt.

151.
10/00696 Matrikulering av øki til røktarheim

Klaksvíkar Kommuna hevur søkt Umhvørvisstovuna um sundurbýti av matr. nr. 1645a, ið liggur í økinum A13, og svarar Umhvørvisstovan í skrivi 29. okt. 2010, at teir ikki vilja góðkenna frámatrikulering av grundøki til røktarheimið, tí teir meta ikki, at ætlanin framgongur í byggisamtyktini fyri økið. Í sama skrivi vísa teir á, at málið kann loysast við at gera eina serstaka byggisamtykt fyri A13-økið. Í skrivi frá Býar-skipanarbólkinum, dagfest 21. nov. 2010 verður skotið upp, at økið, har røktarheimið er ætlað staðsett, verður í byggisamtyktini útlagt sum eitt partsøki undir A13, og fær heitið A13.1. Við øðrum orðum verður A13.1 at rokna sum avgreiddur partur av heildarætlanini, meðan restin av A13 verður at bíða til tann samlaða heildarætlanin fyriliggur. Í somu arbeiðsgongd verður lagt upp til, at umsókn um matrikulering av grundøki og vegatkomu beinanvegin verður send Umhvørvisstovuni til matrikuleringar til avgreiðlsu so skjótt byggisamtyktarligu heimildirnar fyriliggja.

Byggi- og Býarskipanarnevndin, Tekniska Nevnd og Sosiala Nevnd taka á fundi 22. nov. 2010 undir við skrivinum frá Teknisku Umsiting (Býarskipanarbólkinum), dagf. 21. nov. 2010.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt.

152.
09/00315 Bygging av ellis- og røktarheimi í miðbýnum – 1. viðgerð

Umsitingin greiðir í skrivi 29. okt. 2010 frá málinum. Har verður mælt til, at býráðið økir sína játtan upp til 5 mió. kr. í 2010, og at samlaða játtanin hækkar úr 48 mió. kr. til 52 mió. kr.

Tekniska Nevnd tekur á fundi 2. nov. 2010 undir við tilmælinum frá umsitingini, 29. okt. 2010.

Sosiala Nevnd samtykti á fundi 3. nov. 2010 at taka undir við tilmælinum frá umsitingini, 29. okt. 2010, um at hækka játtanina úr 48 mió. kr. til 52 mió. kr. Somuleiðis varð mælt til at økja játtanina upp til kr. 5 mió. kr. í 2010.

Fíggjarnevndin tekur tann 10. nov. 2010 undir við Teknisku Nevnd 2. nov. 2010 og Sosialu Nevnd 3. nov. 2010.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt.

153.
10/00773 Heitið á virkishúsinum fyri eldri

Uppskot um heiti á virkishúsinum fyri eldri (Kjallarin í Sambýlinum á Heygnum) er komið 3. sept. 2010. Umsitingin hevur umrøtt uppskotið, og er vorðin samd um, at uppskot 1 er tað, sum hóskar best.

Sosiala Nevnd beinir á fundi 3. nov. 2010 málið í býráðið og vísir annars til skriv frá áhugabólkinum fyri eldri í Norðoyggjum, dagf. 29. sept. 2010. Somuleiðis vísir nevndin til samtyktina í Sosialu Nevnd, 07. okt. 2010, tá samtykt varð at taka undir við uppskotna heitinum "Ven og virka"

Býráðsins samtykt: Samtykt við 10 atkvøðum fyri og 0 ímóti, at heitið verður "Smæran" við undirheitinum "Ven og Virka". Gunvá við Keldu atkvøddi ikki.

154.
09/00442 Kunning um barnaverndartænastuna – tørvur á sálarfrøðingi

Í skrivi frá umsitingini 27. okt. 2010 verður m.a. nevnt, at tær fyriskipanir, ið Barnaverndartænastan oftast setur í verk, eru sálarfrøðislig viðgerð og familjuviðgerð. Í 2009 nýtti BVT á leið 600.000 kr til sálarfrøðisliga- og familjuviðgerð, og higartil í ár eru nýttar 390.000 kr. Mælt verður til, at sálarfrøðingur verður settur á Sosialu Deild.

Sosiala Nevnd samtykti á fundi 3. nov. 2010, at sálafrøðingur verður settur á Sosialu Deild frá januar 2011 og vísir annars til skriv frá umsitingini, dagf. 27. okt. 2010.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt.

155.
2007-02-004 Gøtuljós til Ánavegin

Kommunan hevur fyrr í ár skrivliga heitt á IMR og LV um at seta neyðug tiltøk í verk fyri at bøta um trygdina eftir Ánavegnum. LV boðar nú frá, at teir møguliga kunnu seta upp gøtuljós eftir Ánavegnum, uml. 1,1 km. Teir treyta sær tó, at kommunan útvegar helmingin av kostnaðinum, ið er 600 tús. kr. LV sigur eisini, at skulu teir vera við í verkætlanini, so skulu gøtuljósini setast upp aftanfyri bilverjuna í niðaru síðu av vegnum. Sí skriv frá umsitingini, dagf. 9. nov. 2010.

Fíggjarnevndin 10. nov. 2010: Vísandi til at Landsverk í 2008 góðtók uppseting í ovaru síðu, verða samráðingar tiknar upp við Landsverk við tilmælinum frá umsitingini 9. nov. 2010 í huga, og arbeiðið verður framt. Gunvá við Keldu luttók ikki í viðgerðini av hesum máli, vegna ógegni.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt. Gunvá við Keldu luttók ikki í viðgerðini, vegna ógegni.

156.
10/00238 Fíggjarætlan 2011 - Býráðið

Á felags temafundi mánadagin 22. november 2010 – har Byggi- og Býarskipanarnevndin, Tekniska Nevnd, Sosiala Nevnd, Mentanarnevndin, Havna- og Vinnunevndin, Heilsu- og Umhvørvisnevndin og Fíggjarnevndin luttóku – varð tikið undir við fyriliggjandi fíggjarætlanaruppskoti, sum við óbroyttum skattaprosenti upp á 22,25 og óbroyttum barnafrádrátti á kr. 4.000,- javnvigar við 138,7 mió. kr. í skattainntøkum og soleiðis útgreinað í høvuðstølum:

Inntøkur	138,70
Rakstur	91,26
	47,44
Rentur	8,60
	38,84
Avdráttur	10,20
	28,64
Íløgur útr.	34,17
Íløgur inntøka	-6,00
Íløgur (netto)	28,17
	0,47

Býráðsins samtykt: Játtanin til "Mentanarhús/Bygdarhús/Skúli" áljóðandi 3. mió. kr. varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og 0 ímóti. Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini, vegna ógegni.
Vísandi til tilmælið frá Fíggjarnevndini 25. nov. 2010 varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og 0 ímóti at taka undir við fíggjarætlanini fyri 2011, sum við 22,25% í kommunuskatti og kr. 4.000,- í barnafrádrátti javnvigar við 138,7 mió. kr. í skattainntøkum og 0,47 mió. kr. í avlopi.